**Formæli**

Starvsfólkapolitikkur landsstýrsins setur karmar fyri tí høvuðspolitikki, sum er galdandi í almennu fyrisitingini.

Starvsfólkaviðurskifti, sum eru ásett í lóg, sáttmála og reglugerð, eru ikki endurgivin í starvsfókapolitikkinum, og ansast má tí eftir, at slíkar ásetingar eisini verða fylgdar, tá talan er um at fremja starvsfólkapolitikkin í verki.

Starvsfólkapolitikkurin verður givin út í pørtum. Hetta fyri at fyrisitingin skal fáa tíð til at seta partarnar í verk, so hvørt sum teir koma út. Á henda hátt fær einstaki stovnurin eisini høvi til at elva til kjak og fáa íblástur til at menna starvsfólapolitikkin á staðnum.

Starvsfólkapolitikkurin fer tí eisini at innihalda vegleiðingar og dømi um, hvussu nærri kann verða fyriskipað í sambandi við ávís viðurskifti.

Ætlanin er at starvsfólkapolitikkurin sum amboð skal elva til, at nádd verða tey høvuðsmál, sum landsstýrið hevur boðað frá og tey mál, sum einstaki stovnurin setur sær.

Marjun Hanusardóttir
løgmansstjóri